Sosialurin





*Hanna og hinir næmingarnir sita so kvirr sum mýs henda fyrsta tíman. Neyvan verða tey altíð so málleys sum í morgun*

# Fyrsti dagur í nýggjum kapitli

**Í dag byrjar skúlagongdin aftur í skúlunum kring landið. Um 680 næmingar eru í dag farnir undir eitt nýtt skeið í lívi teirra. Eitt skeið sum fer at hava mangar broytingar við sær tey komandi árini.**

SKÚLABYRJAN
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Kollafjørður:** Gerandisdagur byrjaði eisini fyri tey 17 øgiliga spentu børnini, sum í morgun kl. 10 skuldu í Kollafjarðar skúla á fyrsta sinni. Hetta er samstundis fyrstu ferð at næmingar fara í tann nýumvælda skúlan.

Tey 17 kollfjarðarbørnini hava gingið við spenningi í langa tíð, og hava sæð fram til henda mánadagin, 14. august 2006. Spurningurin var bara, nær tey skuldu møta.

Dagin hava tey vitað leingi. Tað vantaði bara lýsingin um, nær skúlagongdin byrjaði.

Hesar seinastu dagarnir hava børnini og foreldrini neyvan tosað um stórt annað enn 1. skúladag. Og í morgun upprann hann so umsíðir.

Okkurt barnið hevði verið uppi síðani sólin reis fyrr í morgun, og okkurt barnið hevði havt ilt við at sovna í gjárkvøldið.

- Eg veit líka. Barnið hjá mær fór tíðliga til songar í gjárkvøldið, fyri at vera so væl fyri í morgun sum gjørligt.

- Hann fór til songar beint eftir nátturða, men vaknaði longu kl. 10. Er tað nú morgun, so eg sleppi í skúla?, spurdi barnið.

Tað fekk vinarliga boð um at leggja seg aftur, tí skúlagongdin fyrst byrjaði kl. 10 í morgun.

## Nýtt kapittul

Í gongini í skúlanum stóð lærarin fyri teimum, flokslærarin Jón Højsted. Hann heilsaði uppá hvørt einstakt barnið og foreldrini, sum komu við.

Hetta er kortini ikki fyrstu ferð at tey hittast. Børnini hava í roynd og veru longu verið tvær ferðir í skúlanum áður.

Fyrru ferðina var tá tey vórðu innskrivað at fara í 1. flokk. Í Kollafirði verður hetta gjørt í sjálvum skúlanum. Men tað hendi eisini annað enn tað henda dagin, tá tey møttu upp saman við foreldrum og systkjum.

Tey fingu okkurt til matna, og síðani fingu tey greitt eitt sindur frá um, hvat tað vili siga at fara í skúla. Hetta hendi jú tíðliga á árinum, men kortini var langt fram til dagin, tá tað byrjaði av álvara.

Hesin dagurin var kortini bert tann fyrsti í eini langari røð av skúladøgum, sum stóðu fyri framman. Áðrenn tað veruliga byrjaði skuldu tey koma saman einaferð enn.

Hetta hendi ein dag í juni mánaði, tá skúlin enn einaferð ynskti at hitta hesi 17 spentu børnini í 1. flokki. Hesa ferð var skipað soleiðis fyri, at vitjanin kom at líkjast meiri einum vanligum tíma.

Fyri líkasum at geva teimum eina enn betri mynd av skúlanum og skúlagongdini, var 1. flokkur – sum í morgin fer í skúla sum 2. flokkur – við teimum. Hetta var eisini ein góður dagur.

Men í morgun – kl. 10:00 – byrjaði so eitt nýtt kapitull í lívi teirra, - eitt kapittul sum fer at hava so mangar broytingar við sær. Hjá summum verður skúlatíðin kanska drúgv, og hjá øðrum styttri.

Í øllum førum verður førningurin tey nú fáa við sær av avgerandi týdningi fyri lívsleið teirra. Kanska onkur professari er teirra millum? Onkur rokskipari? Onkur kvinna sum fer at fremja brøgd sum verða tiltikin?

Livst, so spyrst!

## Skógvarnir á hillina

Klokkan var væl í 10, tá tann fyrsti næmingurin kom í skúla á fyrsta sinni.

Saman við foreldrum sínum og eini lítlari systur komu tær báðar so væl pyntaðar inn í skúlagarðin.

Tær vistu, hvagar leiðin gekk, tí tær høvdu verið her áður. Høvuðsdyrnar inn í skúlan eru samstundis leiðin til vitan og lærdóm, sum verður teimum at gagni í framtíðini.

Inni í gongdini kvirt og tómligt. Ikki eitt menniskja at sjá og ikki eitt ljóð at hoyra. Bert flokslærari teirra var har – Jón Højsted.

Hann hevur fyrireikað seg væl til dagin, og var spentur eftir at kunna heilsa uppá teir spentu næmingarnar og foreldur teirra. Spurningurin var kanska, hvør teirra mundi vera mest spentur – næmingurin, foreldrini ella lærarin.

- Góðan dag. Eg eiti Jón. Hvussu eitur tú?

Tað er týðiligt at næmingarnir enn ikki vorðnir so mælskir. Tað er ikki meiri enn at ein hoyrir teir siga nøvn síni.

- Vælkomin í skúla. Hygg, her í skúlanum ganga vit ikki inni í skóm. Men har á vegginum, har kanst tú seta skógvarnar í eina hyll.

- Í dag er eingin annar næmingur í skúlanum, so tú kanst bara seta teir í ta hillina, sum tú vilt. Tú skalt nokk fáa tína egnu hill seinni, sigur Jón.

Næmingarnir so gera, og fara innar í gongina at bíða eftir klokkuni.

## - Fríkorter? Yess!

Klokkan er nú farin beint av 10 og nú skal so skúlagongdin byrja. Jón biður næmingarnar koma niðan í stovuna – Innistovu. Men bert næmingarnir, tí foreldrini sleppa ikki við.

Næmingarnir koma stillisliga og við álvarsomum bragdi innar í stovuna, meðan foreldrini fara inn í aðra stovu til kaffi og smákøkur.

Hesa fyrstu løtuna eru bara lærararnir og næmingarnir saman. Gott er at hava foreldrini beint við síðuna av, um tað skuldi hent at longsulin gjørdist ov stórur.

Tað hava tey helst upplivað okkurt árið, men hjá hesum 17 næmingunum í 1. flokki skúlaárið 2006/07 er hetta ikki neyðugt. Tey ynskja hesa løtuna bara at vera saman við flokkinum og lærarunum.

Í morgun er rættiliga frítt at seta seg. 18 borð eru sett upp og tað er skjótt at tey fyllast. Bert eitt borð stendur tómt, meðan hini eru fylt við 9 dreingjum og 8 gentum.

Ofta sær ein, at tað eru tey aftastu plássini í bussum og aðrastaðni, ið verða vald fyrst. Men her í Kollafirði er øðrvísi. Tað er beinanvegin at seks tey fremstu borðini eru upptikin. Seks spentir dreingir hava her funnið síni pláss. Tað verður helst ringt at fáa teir hagani!

## Voyt tað væl

Hóast 17 næmingar eru savnaðir saman her í Innistovu í morgun er sera kvirt. Tað er týðiligt at virðingin fyri lærarum teirra er stór í morgun.

Jón stendur har frammi við pultin og bjóðar teimum enn einaferð at vera vælkomin í skúlan.

- At ganga í skúla merkir at tit koma at læra nógv og at tit eisini koma at arbeiða nógv, sigur hann.

Líkt er til, at næmingarnir eru fyrireikaðir uppá slíkt. Ein drongur á aftasta raðnum svarar beinanvegin:

- Eg voyt tað tað væl!

Jón verður flokslærari teirra og kemur at hava tey m. a. í føroyskum. Hann greiðir teimum eitt sindur frá bókunum, tey fara at nýta hetta fyrsta árið – Sóljan, Hervør og Høgni í skúla og onkra aðra.

- Vit fara tó eisini at syngja nógv og spæla, bæði úti og inni. Og so fáa tit eisini fríkorter, har tit kunnu spæla úti í tí stóra skúlagarðinum.

Dreingirnir á aftasta beinki eru klárir við svarinum beinanvegin:

- Fríkorter? Yess!

Roknilærari teirra greiðir frá bókini, tey skulu nýta í rokning, og kristnilærarin tað sama.

- Vit tit forrestin, hvat kristni er fyri nakað, spyr hon.

Tað er tøgn í stovuni eina lítla løtu, inntil ein genta heldur seg hava svarið:

- Kristni, - er tað ikki tað sama sum lítla Kristin?

Hon eigur helst onkran kæran sum ber hetta navnið. Men hetta er ikki júst innihaldið í hesi lærugreinini.

Jón hevur frammanundan skrivað VÆLKOMIN við stórum bókstavum á talvuna. Nú spyr hann børnini um tey duga at stava orðið.

Hann byrjar sjálvur við bókstavinum V, og síðani taka børnini eftir honum. Tað gongur spakuliga við tveimum teimum fyrstu bókstavunum, men tá hann er komin til KOMIN eru tey næstan skjótari enn hann.

- Ja, her stendur "væl og komin", og tað vilja vit eisini fegin siga við tykkum. Tit skulu vera so hjartaliga vælkomin í skúla í dag.

- Vit vóna at tit fáa ein góðan dag og nøkur góð ár her í skúlanum. Í dag gera vit ikki so nógv, tí um eina løtu fara foreldrini at koma inn, sigur flokslærarin.

Hesin fyrsti dagurin byrjaði væl. Í morgin byrjar álvarin!!